Næraberg og gagnnýtsla av svartkjafti

Bergur Poulsen,
stjóri á Havsbrún

Í blaðútgávuni Fregnum 11. maj í ár, stóð ein áhugaverd grein um Næraberg og hansara royndir at framleiða svartkjaft til Surimi. Tað er skrivað um hetta evnið áður í øðrum bløðum, m.a. í Fiskimannablaðnum fyri nøkrum vikum síðan, har baksíðan gav lesarunum upplýsingar um hvussu svartkjaftur kundi »gagnnýtast«. Eg kann ikki lata vera við at koma við viðmerkingum til hetta evnið, og hetta at »gagnnýta« okkara tilfeingið á skilabesta hátt.

Sagt verður, at um svartkjafturin verður landaður til íðnað er prísurin bert 55 oyru, og at »á Havsbrún verður svartkjafturin eisini góðskaður, men ikki nær so nógv sum umborð á Næraberg«. Fyri 18.000 tons selur Næraberg surimi og mjøl fyri 37 mio kr, meðan ein annar svartkjaftabátur bert selur fyri 10 mio kr. Um vit nýta sama hugsunarhátt sum í nevndu grein í Fregnum, verða 18.000 tons av svartkjafti á Havsbrún virkaði til uml 3.600 tons av mjøli og 900 tons av lýsi. Hetta verður víðari virkað til uml 7.200 tons av laksafóðuri (50% av laksafóðuri er fiskamjøl). Úr hesum fóðuri, verða ald uml. 7.000 tons av laksi fyri ein kiloprís uppá umleið 25 kr. Tað gevur eitt søluvirði uppá uml. 175 mió kr. Hetta ljóðar jú avbera vakurt, men er líka skilaleyst og villeiðandi tos sum tær 37 milliónirnar hjá Næraberg. Niðanfyri verður grundgivið fyri hví so er.

Hvat merkir hugtakið virðisøking?

Tá tað í greinini verður sagt, at Næraberg hevur fiskað fyri 37 mió kr, so er hetta ikki í sær sjálvum ein virðisøking. Tá tosað verður um tjóðarbúskap er virðisøking munurin ímillum framleiðslurvirði og nýtsluna av rávørum og hjálpievnum. Ella við øðrum orðum: Løn + vinningur – studning. Vit seta tí eitt roknistykkið upp fyri Næraberg fyrst.

Talva 1
NÆRABERG

Nøgd	18.000 tons	Viðm.
Søluvirði	37 mió kr.	
Rakstrarútreiðslur	13 mió kr.	mettar útreiðslur
Nettosøla	24 mió kr.	
Hýra incl. yvirmannapartar 42% av netto	10 mió kr.	
Kapitalútreiðslur	14 mió kr.	ivaleyst væl meiri
Vinningur	0 mió kr.	smb. reiðaran
Dagstudningur	0 mió kr.	
Løn + Vinningur	10 mió kr.	ivaleyst minni enn hetta

Vit vita ikki, hvussu stórur vinningurin er, men reiðarin á Næraberg sigur, at tað kanska er eitt lítið undirskot, og tískil kann virðisøkingin ikki verða størri enn 10 mió kr. (Ongin rokniskapur fyri ár 2000 fyriliggur enn, tíverri!). Vit kenna ikki støddina av dagstudninginum til Næraberg, sum tí ikki er tikin við, men hann ger ikki roknistykkið betri. Tó kann nevnast, at samlaði dagstudningurin til Næraberg í fjør lá um góðar 2 mió kr. Stutt kann sigast, at virðisøkingin fyri tey 18.000 tonsini helst liggur nakað væl undir 10 mió kr.

Fyri tey sum ikki vita tað, so eru tað eisini nakrir føroyskir bátar sum fiska svartkjaft til íðnað, og tað finst eitt mjøl og fóðurvirkið í Føroyum sum framleiðir mjøl, lýsi, fóður og laks burturúr svartkjaftinum. Lat okkum tí hyggja at hesum roknistykkinum:

Talva 2
NÓTABÁTUR

Nøgd	18.000 tons	Viðm.
Søluvirði (18.000 x 0,63)	11,34 mió kr.	
Rakstrarútreiðslur	4,00 mió kr.	mettar útreiðslur
Nettosøla	7,34 mió kr.	
Hýra incl. yvirmannapartar 26 % av brutto	2,95 mió kr.	
Kapitalútreiðslur	2,59 mió kr.	
Vinningur	1,80 mió kr.	
Dagstudningur	0 mió kr.	
Løn + Vinningur	4,75mió kr.	

Tey 18.000 tonsini sum hesin báturin fiskar, verða landaði á Havsbrún, og her verður fiskurin fyrst framleiddur til mjøl og lýsi.

MJØLFRAMLEIÐSLA

Rávørunøgd	18.000 tons
Løn (18.000 tons x 150 kr/tons)	2,70 mió kr
Vinningur (18.000 tons x 70 kr/tons)	1,26 mió kr
Løn + Vinningur	3,96 mió kr

Roknistykkið er higartil sera einfalt. Prísurin uppá 63 oyru er miðalprísurin fyri kg fyri eitt føroyskt svartkjaftaskip, sum hevur landað á Havsbrún higartil í ár.

Men Havsbrún framleiðir ikki bert fiskamjøl og lýsi, men góðskar vøruna víðari til fóður. Lat okkum tí hyggja at tí roknistykkinum eisini. Við eini 20% úrtøku av mjøli og 5% av lýsi, verða 18.000 tons av svartkjafti virkaði til umleið 3.600 tons av mjøli og umleið 900 tons av lýsi. Hetta verður framleitt til uml. 7.200 tons av laksafóðuri. Roknistykkið fyri hesa framleiðsluna sær nøkunlunda soleiðis út:

FÓÐURFRAMLEIÐSLA

Nøgd	7.200 tons
Løn (7.200 tons x 200 kr/tons)	1,44 mió kr
Vinningur (18.000 tons x 300 kr/tons)	2,16 mió kr
Løn + Vinningur	3,60 mió kr

Tøl kunnu altíð verða ivasom, og vinningurin er kappingartreytaður, men tann sum hevur hug at kannað eftir, hvørs talmaterialið er rætt, kann altíð hyggja í roknskapin fyri ein av størru nóta/trolbátunum og Havsbrún í fjør og í ár, tá hann kemur. Um vit leggja omanfyristandandi rokniskapir saman, verður úrslitið sum fylgjandi:

Vinnugrein	**Virðisøking**	**Viðmerking.**
• Nótabátur	4,75 mió kr	
• Mjølframleiðsla	3,96 mió kr	
• Fóðurframleiðsla	3,60 mió kr	
Íalt	12,31 mió kr	

Í omanfyristandandi uppseting eru ongir ringvirkningar (multiplikator-effekt) frá hesum vinnum tiknir við, av tí orsøk at tað ger uppsetingina alt ov fløkjasliga. Men eg tori at pástanda, at ringvirkningarnir frá 18.000 tonsum av svartkjafti, sum eru fiskaði umborð á einum føroyskum svartkjaftatrolara, framleiddur til fiskamjøl og lýsi, fyri síðan at verða framleiddur til laksafóður á Havsbrún eru ikki minni enn um Næraberg er í vinnu og framleiðir tað til surimi, heldur tvørturímóti. Men Havsbrún er eisini við í aling av laksi og við til at góðska laksin, so virðisøkingin er í veruleikanum væl meiri, enn tað sum er nevnt her í greinini. Seinni verða kanska stundir at greina hetta roknistykkið meiri, men var onki mjølvirki, var heldur ongin fóðurframleiðsla og kanska heldur ikki so nógv aling sum tað er í dag.

Samanumtikið:

Høvuðsendamálið við øllum vinnum er fyrst og fremst, at vinnan ber seg uttan studning og er kappingarfør. Bert við at gagnnýta møguleikarnar og virðisøkja rávøruna best møguligt er vinnan kappingarfør. 18.000 tons av svartkjafti til eitt søluvirði uppá 37 mió kr er IKKI ein virðisøking uppá 37 mió kr, men í besta fall ein virðisøking sum er minni enn 10 mill. kr. Hetta skal samanberast við virðisøkingina til alifóður, sum í løtuni er meiri enn 12 mill. kr!

Í greinini verður eisini róð framundir, at royndirnar hjá Næraberg mugu havast í huga, tá føroysk svartkjaftavinna verður løgd til rættis framyvir. Tað skulu politikarnir í seinasta enda avgera, men tað er ONKI, hvørki fíggjarligt, ella samfelagsbúskaparligt argument fyri, at Næraberg skal hava nøkur framíhjárættindi í mun til restina av svartkjaftavinnuni, tað verið seg á sjógvi ella á landi. Heldur ikki um prísurin á surimi fer upp, tí vit skulu bert aftur til 1998, tá var prísurin á svartkjafti til íðnað umleið 1 krónu, ella 59% hægri enn hann er í dag. Um framíhjárættindi (exclusiv) verða givin til eina ávísa vinnu, so skal tann vinnan, sum í skjótt 40 ár hevur klárað seg, gjalda fyri nakað, sum kanska ikki loysir seg, og hetta er vánaligur búskapur og politikkur. Latum okkum ikki tosað um fuglarnir sum flúgva, men heldur um teir vit hava í hondini; fyrst í øllum førum.

Næraberg skal fiska svartkjaft til surimi um tað er ein góð forrætning fyri P/F JFK-Seafood, men tann politiski myndugleikin má fyri alt í verðini ikki gera tað dáragerð, at geva hesari vinnuni nøkur framíhjárættindi útfrá teimum tunnu og villeiðandi argumentunum, sum stóðu at lesa í greinini í Fregnir tann 11. maj og sum eisini hava verið at sæð aðrastaðni í teimum føroysku bløðunum. Tað hava vit ov góðar politikarar til.

Greinin í Fregnir tann 11. maj endar við at siga, at: »Tosa vit um fullveldi og sjálvberandi búskap, mugu vit eisini tosa um maksimala virðisøking og maksimalt avkast til búskapin« Tað er rætt. Vit hava brúk fyri góðum og gløggum vinnulívsfólki við dirvi og árræði. Men tíðin eigur at verða farin frá at nýta villeiðandi »argumentir«. Fyrsta treytin fyri at taka røttu avgerðirnar í hesum sambandi er, at vit gera okkum greitt hvat maksimal virðisøking og maksimalt avkast til búskapin merkir. Fyrr enn hetta er fullkomiliga greitt fyri bæði vinnulívsfólki og politikarum, verður als onki fullveldi. Tað hjálpir ikki at vit góðska okkum út á bláman, um hetta ikki loysir seg, tí at allur meirvinningurin fer útaftur í rakstrar- og kapitalútreiðslum. Vit royndu hetta í áttatiárunum, og øll kenna úrslitið.

Vónandi hevur omanfyristandandi grein lýst málið eitt sindur betri enn gjørt er frammanundan, og kann verða ein íblástur til eitt meiri fjøltáttað orðaskifti um gagnnýtslu av okkara tilfeingi. Eitt skal í øllum førum sláast fast: Allur svartkjafturin, sum verður landaður til íðna á Havsbrún í Fuglafirði, verður væl og virðilig gagnnýttur allur sum hann er. Onki fer burtur.

FISKIVINNUTÍÐINDI

Fiskilógin gongur í móti ICES

Jørgin Niclasen, fiskimálaráðharri

Lógin um vinnuligan fiskiskap gongur beinleiðis móti tilmælum frá ICES, eisini í sínum grundsetningi. Lógin ásetir eitt veiðuúttak uppá 33 prosent av fiskastovninum og hetta heldur ICES vera óforsvarligt at hava sum fasta skipan. ICES kann ganga við til at so nógv verða tikin ávís ár, men ikki sum fasta skipan.

Men altjóða havrannsóknarstovnurin er bara ráðgevandi og tí er tað mangan ein spurningur um gambling, tá politikkarar taka støðu til hvussu nógv skal veiðast av einum ávísum stovni.

Eitt dømi um hetta er íslendska toskakvotan fyri komandi ár. ICES mælir til at veitt verða ikki meira enn 164.000 tons fyri at stovnurin skal koma fyri seg aftur. Hetta eru eini 60.000 tons lægri enn veiðan í ár og íslendingar hava eina lóg sum sigur, at kvotan kann ikki lækkast so nógv eftir einum ári, at tað fær alt ov álvarsligar avleiðingar fyri vinnuna.

Tí mæla íslendsku fiskifrøðingarnir til at íslendska toskakvotan verður 190.000 tons, ella næstan 30.000 tons meira enn ICES.

Leikluturin hjá politikkarunum er ofta at vága, tí meira veitt verður av einum stovni, sum er illa fyri, seinni veksur hann aftur. Men politikkararnir vága ikki uttan nakað grundarlag. Tí tað er ikki bara minkað veiðutrýst, sum kann menna ein stovn. Tað eru fleiri aðrir lutir sum gera seg galdandi og tann mest avgerandi er gróðurin í sjónum. Hesin kann skunda undir nógv skjótari enn mannaskapt tiltøk.

Hýsan illa fyri

ICES heldur, at hýsustovnurin undir Føroyum ikki er nóg væl fyri.

Gýtingarstovnurin er 39.000 tons og tað eru 1000 tons undir, hvat ICES metir er forsvarligt fyri at stovnurin kann mennast og mest kann fáast burtur úr honum. Veiðutrýstið er eisini omanfyri tað sum er forsvarligt, skal fáast sum mest burturúr hýsustovninum.

ICES mælir til, at bann verður sett fyri at veiða hýsu í komandi ári.

Samstundis verður mælt til, at ein ætlan verður gjørd, sum tekur hædd fyri, at hýsa eisini verður veidd í veiðu eftir øðrum sløgum og at hetta minkar um stovnin.

Av tí at hýsa verður fiskað í blandaðum fiskiskapi eftir toski og upsa, má stig takast til at minka sum mest um hýsuveiðuna í tílíkum fiskiskapi.

-Hóast hýsa ferðast víða, so finnast hýsuleiðir, har hon stendur so tøtt, at ein heilur árgangur kann koma undan bara av eini leið. Tí er tað týdningamikið at fríða hesar hýsuleiðir, sigur Hjalti í Jákupstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni.

Grønlendingar fáa fylgisveinaeftirlit

11. juni verður ein skipan sett í verk, har øll positiónin hjá øllum grønlendskum skipum verður skrásett yvir fylgisvein.

Sambært grønlenska útvarpinum, so kostar útgerðin, sum verður sett umborð á minni skip 20.000 krónur og á størri skip 30.000 krónur. Rakstaraútreiðslurnar eru roknaðar til 5000 krónur árliga, veit íslendska vevsíðan InterSeafood at siga.

Skipanin økir um trygdina og gevur eisini myndugleikunum betri møguleikar at fylgja við fiskiskapinum.

Ósemja um kongafiskin í Irmingarhavinum

Fiskifrøðingar eru ikki samdir, um talan er um ein ella tveir stovnar av kongafiski í Irmingarhavinum. Irmingarhavið er uttan fyri millumtjóða felagsskapin um NEAFC og í hesum felagsskapi eru eisini russar. Russar eru ikki samdir við øðrum londum, sum veiða kongafisk í Irmingarhavinum.

Jákup Reinert, fiskifrøðingur

Fiskifrøðingar vestanfyri eru vísir í at talan er um tvey sløg av kongafiski í Irmingarhavinum. Tað eina slagið heldur til á djypri vatni og djúp-havskongafiskurin undir Føroyum, Íslandi og Eysturgrønlandi er av hesum sama stovni. Hesin kongafiskur er størri enn tann sum gongur ovari í sjónum og sum verður roknaður fyri at vera ein stovnur fyri seg.

– Tað kann vera torført at skilja stovnarnar at, tí alt eftir hitanum í sjónum, so kunnu báðir stovnar blanda seg saman, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

– Ein kanning av upsastovnunum í Irmingarhavinum verður gjørd í summar og úrslitið av hesi fyriliggur eftir ólavsøku, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

Ringt at meta um bankatoskin

Stóri toskurin í sjálvstøðuga stovninum á Føroyabanka hevur tað gott. Ella fiskifrøðingar halda ikki, at tað stendur illa til við stovninum. Tað ber ikki neyvt til at meta um stovnin í løtuni, men stovnurin er eftir øllum at døma um miðal ella gott tað. Hetta sæst av teimum landingum, sum eru av Føroyabanka og av teimum yvirlitstrolingum, sum Magnus Heinason hevur gjørt.

Fiskiskapurin á Føroyabanka verður stýrdur á tann hátt, at trolarar sleppa ikki longur upp á 200 metra dýpi og línubátarnir hava fingið 30 fiskidagar í part omanfyri 200 metrar.

– Toskurin ferðast víða á Føroyabanka heilt niður á 500 metra dýpi, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

Fiskirannsóknarstovan er ikki so væl nøgd við, at loyvt er at royna á Føroyabanka og á landgrunninum á sama túri. Hetta oyðileggur tey annars sera góðu søguligu veiðuhagtøl, sum vit eiga av Føroyabanka.

ICES mælir til at uppgerðin av veiðuhagtølum á Føroyabanka verður fingin í rætt lag, tí at toskastovnarnir á landgrunninum og á Føroyabanka eru so ymiskir, tí verður tað ógjørligt í framtíðini at gera stovnsmetingar av Føroyabanka.

Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

28 bátar seldu knøpp 10 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mikudagin

Syslunummar	Skipanavn	Reiðskapur	kilo
FD 18	Sirið	lína	242
FD 123	Riddarin	snella	112
FD 256	Aðnasker	snella	125
FD 316	Annfríð	snella	70
FD 424	Morning star	snella	215
FD 428	Margit j	lína	141
FD 571	Durita	lína	484
FD 67	Huldusteinur	lína	330
FD 780	Bakkafossur	snella	71
FD 783	Glúpur	lína	487
FD 855	Lómur m/b	snella	422
FD 981	Másin	snella	96
FD1038	Strúkur	lína	31
KG 125	Bjarnaberg	lína	349
KG 129	Brattaberg	lína	680
KG 193	Fliðan	snella	221
KG 23	Nancy	lína	97
KG 243	Gudrun	gørn	70
KG 423	Jaspissteinur	snella	232
KG 430	Báran	lína	770
KG 47	Havsbrún	lína	1.017
KG 512	Neshamar	snella	309
KG 63	Pollur	lína	366
KG 79	Nevið Reyða	lína	809
TG 300	Líðarbrøður v/H. Joensen	snella	941
TG 797	Norðfarið	snella	510
TN 198	Kvívíks Elsba	lína	274
VA 366	West freezer	lína	444

Vorunavn	kilo		
Brosma 0	35	Longa 2	66
Brosma 2	91	Reyðsprøka 0	16
Brosma 3&4	2	Skøta	161
Hýsa 1	1.648	Steinbítur	135
Hýsa 2	1.426	Toskur 1	166
Hýsa 3	1.116	Toskur 2	536
Hýsa 4	429	Toskur 3	1.147
Havtaska 0	99	Toskur 4	1.076
Hvítingur 0	123	Toskur 5	658
Kalvi 1	142	Upsi 0	77
Kalvi 2	58	Upsi 2	26
Kalvi 3	25	Upsi 3	193
Kalvi 4	21	Upsi 4	215
Kalvi 5	1	Upsi 5	11
Kongafiskur 0	100		
Longa 0	13		
Longa 1	103		